Chicago:

# Til sangleik í London

**Í London eru góðir møguleikar at fara til onkran kendan sangleik, og vit valdu eisini at royna hetta. Vit valdu leikin Chicago, har syngjandi og dansandi kvinnuligir fangar blástu okkum um koll**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Sangleikurin, Chicago, var heilt ótrúliga góður, og hetta gjørdist eisini ein av góður endi uppá ein ógloymandi túr í London*

Síðsti dagurin í London var nú vorðin veruleiki, og dagin eftir skuldu vit heimaftur til Føroyar. Vit vaknaðu av sólini tíðliga um morgunin, og tá vit komu upp, sóu vit, at veðrið var av tí allarbesta.

Vit valdu enn einaferð at fara ein lítlan túr inn í býin at keypa, men hugurin var ikki líka góður henda dagin, sum hann hevði verið undanfarnu dagarnar. Túrurin á Oxford Street bleiv heldur ikki langur, og vit valdu eftir eini løtu at venda nøsini heim á hotellið við tí, vit høvdu keypt henda morgunin.

Vit vóru ikki leingi á hotellinum, men fóru í staðin ein túr inn aftur í býin. Vit gingu ein túr ígjøgnum Kensington Gardens, áðrenn vit komu til Piccadilly. Her settu vit kósina ímóti Leicester Square, tí vit høvdu tikið avgerð um at fara til ein sangleik henda síðsta dagin í London.

## Stórt úrval

Eftir ein rættiliga langan túr frá hotellinum komu vit endiliga til Leicester Square, og her fóru vit at leita eftir støðum, har vit kundu keypa atgongumerki. Tað gekk ikki long tíð, fyrrenn vit funnu ein sølumann, og so skuldu vit finna útav, hvønn leik vit vildu sleppa til.

Størsta ynski hjá okkum var at sleppa til ein av kendastu sangleikunum, Cats, men hetta var tíverri ikki møguligt, tí atgongumerkini vóru útseld nógvar dagar fram. Tí máttu vit velja ein annan leik, og her vóru nógvir í at velja. Billy Elliot, Starlight Express, Mama Mia, Phantom of the Opera og nógvir aðrir tóktust vera rættiliga góðir og spennandi, men at enda fall valið á Chicago.

Maðurin handan diskin segði, at hetta var ein av hansara yndis sangleikum, so vit valdu at royna henda leikin, og hetta bleiv eitt gott val.

## Sera góður leikur

Tá vit høvdu keypt okkum atgongumerkini, fóru vit heimaftur á hotellið at hvíla okkum eina løtu, áðrenn vit skuldu inn aftur í býin til sangleikin.

Løtu seinni vóru vit úthvíld og væl fyri, so nú vóru vit klár at fara til Chicago. Vit leigaðu ein hýruvogn inn í býin, og løtu seinni stóðu vit uttanfyri leikhúsið. Vit vóru ógvuliga spent til sangleikin, og vit høvdu ikki meir enn sett okkum niður, áðrenn vit snøgt sagt blivu blást um koll av syngjandi og dansandi kvinnuligum fangum, sum gjørdu alt fyri at sláa til innan undirhaldsvinnuna.

Vit sótu bergtikin og fylgdu stríðnum hjá hesum kvinnuligu fangunum í teir báðar tímarnar, leikurin vardi. Tá leikurin kom at enda, hevði man bara hug at vera sitandi og bíða eftir næstu sýning. Her var tó einki at gera. Leikurin var liðugur, og vit valdu tí at fara heimaftur á hotellið. Vit vóru tó samd um, at hetta skuldi roynast aftur, næstu ferð vit vóru í London.

Chicago var ein sera góður endi uppá ein ógloymandi túr í London. Næsta dagin gekk leiðin aftur til Føroyar, og London var yvir á hesum sinni. Túrurin hevði tó verið avbera góð, og vit vóru væl nøgd á heimferðini til Føroya.



*Puntur nummar 5 av 23*




Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari